Sosialurin

Nr. 226 - 25. november 2009

## Langomma smuglari

Norska ákæruvaldið hevur skuldsett eina 72 ára gamla kvinnu fyri at hava roynt at smugla 11 kilo av heroini til Noregs. Kvinnan varð tikin í summar, tá hon kom til Oslo við einari ferju úr Kiel í Týsklandi. Í kufferti hennara fann løgreglan 11 kilo av heroini og 1.000 amfetamintablettir. Blaðið Dagbladet skrivar, at varð heroinið selt á gøtuni í Oslo, hevði prísurin verið um 16 milliónir norskar krónur. Norska løgreglan er sannførd um, at kvinnan var ikki einsamøll um smuglingina, men enn er bara hon skuldsett í málinum. Hon kann fáa upp í 15 ára fongsul, skrivar Dagbladet.



## Bretar vistu um píning

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch ákærir nú Bretland fyri at hava vent tað blinda eygað til í einum máli um píning í Pakistan. Sambært felagsskapinum hava bretar lagt trýst á pakistonsku myndugleikarnar fyri at fáa teir at noyða menn, sum vóru undir illgruna fyri yvirgang, at avdúka týðandi upplýsingar, sama hvussu tað bleiv gjørt. Human Rights Watch sigur, at bretskir embætismenn vistu fullvæl, at pakistanska fregnartænastan pínir ofta fangar, men at embætismenninir vendu tað blinda eygað til. Uttanríkisráðið í London vísir skuldsetingini aftur.

## Tilbúgvingin riggaði til fulnar

**Stórt apparat varð sett ígongd, tá ið Smyril misti framdriftina í ófantaligum veðri í gjárkvøldið**

SMYRIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tilbúgvingin hjá Strandferðsluni riggaði til fulnar, tá ið Smyril brádliga fekk tekniskar trupulleikar stutt eystur úr Nípuni á veg til Suðuroyar í gjárkvøldið í nógvum eystanvindi og ófantaligum líkindum.

Tá ið vakthavandi á Strandferðsluni fekk boðini av Smyrli klokkan 20 í gjárkvøldið, boðaði hann MRCC støðini frá beinanvegin.

Tvøroyrar havn fekk eisini boð við umbøn um at fáa skip út ímóti Smyril at hava til Taks at sleipa, skuldi tað blivið neyðugt.

Borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, sigur, at tað tók ikki meiri enn 24 minuttir frá tí at boðini komu, til størsta skip á fjørðinum, lemmatrolarin, Rankin, var á veg út ímóti Smyrli.

Boð vóru eisini send eftir Brimli at vera til reiðar.

Tað gekk ein løta, so fekst fult tamarhald aftur á skipinum og skiparin boðaði frá, at hann sigldi ímóti landið og sostatt legði Smyril at bryggju klokkan 21.30, ein tíma seinkaður.

Sostatt verður sagt, at akkurát í hesum føri var ongantíð vandi á ferð, men at tað sjálvsagt kunnu standast stórir trupulleikar av at missa framdriftina og tat hetta tí er eitt mál, sum eigur at loysast.



*Í morgun var stórfundur á Strandferðsluni á Tvøroyri við landsstýrismanninum á odda, saman við Skipaeftirlitinum, klassanum og El-Service á Skála fyri at koma tenisku trupulleikunum á Smyrli til lívs fyri alla tíð*

# Trygdin á Smyrli fram um alt

**Johan Dahl, landsstýrismaður, sigur, at nú skulu trupulleikarnir við tekniskum brekum á Smyrli kannast til botns og loysast endaliga**

SMYRIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit taka trygdina fram um alt.

So avgjørdur er Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, tá ið vit hittu hann á Skrivstovuni hjá Strandferðsluni á Tvøroyri í morgun.

Saman við klassanum, Skipaeftirlitinum og El-Service á Skála, kom landsstýrismaðurin suður á Tvøroyri við tyrlu í morgun í eini roynd at finna eina endaliga loysn á teimum teknisku trupulleikunum, sum hava plágað Smyril av og á, síðani hann kom.

Seks ferðir hevur hann meiri ella minni mist maskinkraftina og eina aðru ferðina hevur hann havt tekniskar trupulleikar.

Tíbetur er hetta antin hent ímeðan hann hevur ligið við bryggju, ella í rúmum sjógvi í fínasta veðri.

Fyri stuttum varð boðað frá, at stig vórðu tikin fyri at loysa trupulleikan so væl sum gjørligt til Smyril kundi fara í dokk næsta ár, har ein endalig loysn skuldi takast.

Men aftur í gjárkvøldið gekk galið, tá ið Skrúvan á Smyrli brádliga koplaði úr, so at hann misti tað allarmesta av framdriftini við 56 ferðafólkum umborð.

Tá var Smyril staddur eystur úr Nípuni, hálvan annan fjórðing úr landi. Og hesuferð varð ikki talan um góðveður, tí hann var landsynningur eystan í ættini og vindferðin var einar 15 metrar um sekundið og tað eru rættiliga ófantalig líkindi.

Tað tók 15 minuttir til Smyril fekk framdrift aftur og tað fyrsta, sum skiparin gjørdi, varð at sigla burtur frá landið fyri at fáa eina trygdarfrástøðu.

Men eina løtu seinni fingu teir fult tamarhald á støðuni aftur og sigldu upp havn á Krambatanga, har hann legði at klokkan 21.30, ein tíma seinkaður.

### Loysti ikki aftur

Og nú varð ovboðið hjá Strandferðsluni og tí boðaði leiðslan á stovninum landsstýrismanninum frá støðuni. Samstundis boðaði Strandferðslan frá, at Smyril skuldi verða liggjandi á Krambatanga til Skipaeftirlitið, Klassin og serfrøðingar hava kannað skipið.

Sostatt komu allir partar suður við Tyrluni í morgun, men áðrenn blaðið fór til prentingar á miðdegi, var ongin niðurstøða gjørd.

Samstundis vóru túrarnir av Krambatanga í morgun og úr Havn beint fyri miðdag, avlýstir.

Óvist var á miðdegi, nær Smyril kundi loysa aftur, men í morgun væntaðu tey, at tað bleiv einaferð í dag.

### Trygdin fram um alt

Johan Dahl sigur í stuttari viðmerking í einum steðgi á fundinum á Strandferðluni, at henda støðan kann ikki halda fram og at ein endalig loysn nú má finnast.

- Nú ætla vit at koma til botns í trupulleikanum fyri at bæði politiski myndugleiki, Strandferðslan og ikki minst ferðafólk, kunnu hava fult álit á skipinum, sigur hann.

Hann sigur, at hann hevur tosað bæði við løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum og eisini teir skilja og taka undir við, at tað er neyðugt at finna neyðugu játtanina fyri at koma trupulleikunum til lívs og at Smyril má sleppa í dokk næsta ár, har ein endalig loysn kann finnast.